TILBÚGVINGARSTOVNURIN



# VAKTGANGANDI STARVSFÓLK TIL MRCC-TÓRSHAVN

Eitt avloysarastarv sum vaktgangandi á MRCC-Tórshavn (Maritime Rescue Co-ordination Centre) er leyst at søkja. Starvið er tíðaravmarkað til 1. august 2008.

**Starvið inniber hesar uppgávur**
- Skiftandi vaktir og ábyrgd av vaktini
- Tilkallivakt
- Móttaka fráboðanir og taka støðu til hjálparveitingar á føroyska landgrunninum
- Vanligt fyrifallandi arbeiði á vaktini, t.d. skráseta ymiskt í sambandi við tilbúgvingina

**Førleikakrøv**
- Nautiska ella aðra viðkomandi útbúgving
- Duga at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum
- Kunnleika til teldur
- Gildugt GMDSS prógv

**Setanartreytir**
Starvið er lønt í 27. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið. Starvsheitið er eftirlitsfólk.
Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskriv-stovuna. Tænastustaðurin í løtuni er MRCC-Tórshavn.

**MRCC-Tórshavn bjóðar**
eitt avbjóðandi starv, sum virkar undir altjóðareglum hjá IMO og føroyskum lógarverki.
Ískoytislæru um: Leiting og bjargin og hvussu farast skal fram, um dálking kemur fyri.

**Persónligir eginleikar**
Kunna arbeiða sjálvstøvugt. Vera fyrikomandi og duga at samstarva við allar partar í tilbúgvingini her á landi og í útlandinum.
**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til MRCC-Tórshavn, Robert J. Olsen, tlf. 351302, ella teldupost manager@mrcc.fo

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða MRCC-Tórshavn, Tinghúsvegur 64, Postrúm 1120, 110 Tórshavn í hendi áðrenn klokkan 14.00 mikudagin 2. apríl 2008.

*Tilbúgvingarstovnurin fevnir um Sjóbjargingarstøðina (MRCC-Tórshavn), Neyð- og Trygdartænastuna, Tilbúgvingarsamskipanina og Brunaumsjón Landsins. Í løtuni starvast tilsamans 21 fólk á stovninum.*

www.fisk.fo


# Karamellur

Avmarkað nøgd

1 kg. fyri bert

69,95




Fæst á hesum støðum
Shell á Frælsinum
Shell við Ringvegin
Shell í Gøtudali
Shell í Klaksvík